UTTAN ÚR HEIMI

## Hjálparfólk verða verandi í Irak

Teir norsku hjálparfelagsskapirnir, sum hava fólk í Irak, hava boðað frá, at teir fara ikki at taka síni starvsfólk úr landinum, hóast vandi er fyri kríggi. Somu felagsskapirnir hava fólk í fleiri av grannalondunum hjá Irak, og tey fáa heldur ikki boð um at fara haðani.

Talsfólk hjá felagsskapunum siga, at tey fylgja gjølla við tí, sum hendir í Irak og í økinum yvirhøvur. Tey halda seg til tær upplýsingar, sum tey fáa frá ST, og sambært hesum er eingin vandi á ferð í løtuni, siga talsfólkini.

Sunnudagin fór ST undir at flyta síni starvsfólk úr Irak og Kuwait orsakað av vandanum fyri kríggi við Irak.

## Mæla til at avtaka miðnámsskúlar

Sjey danskir serfrøðingar í undirvísingarviðurskiftum mæla í einari nýggjari frágreiðing myndugleikunum til at taka av studentaskúlan, handilsskúlan og vinnuskúlarnar. Ístaðin skal skúlin hava eina trý ára útbúgving frá 9. til 11. flokk, siga tey.

Tey sjey vísa á, at sum er gevst fimti hvør næmingur í danska skúlaverkinum orsakað av vantandi evnum, og hetta halda tey vera eitt prógv um, at verandi skúlaskipan virkar ikki eftir ætlan.

Ístaðin mæla tey til at skipa eina grundútbúgving frá 9. til 11. flokk, har næmingarnir kunnu velja ymsar fakbólkar. Ikki fyrr enn aftan á 11. flokk skulu næmingarnir so velja, um teir ætla sær at taka eina vinnuútbúgving ella eina ástøðiútbúgving. Tey sjey siga, at hesin hátturin hevði gjørt, at nógv fleiri næmingar høvdu verið førir fyri at velja ta røttu útbúgvingina, og harafturat hevði tann nýggja skipanin serliga gagnað teimum veiku næmingunum.

## OPEC leggur krígsætlan

Felagsskapurin hjá oljuútflytaralondunum, OPEC, fer hesa vikuna at leggja eina ætlan um, hvat gerast skal, leypa amerikanarar og bretar á Irak.

Málið við fundinum er at sannføra heimin um, at nóg mikið av olju verður á altjóða marknaðinum, sjálvt um kríggj skuldi brostið á. Eitt annað endamál við fundinum er at forða fyri, at oljuprísurin fer ov langt upp. Undir Flógvakrígnum í 1991 kom oljuprísurin upp í 41 dollarar fyri tunnuna, men hesaferð ætlar OPEC ikki, at hann skal koma so langt upp.

Tað drúgva verkfallið í Venesuela herfyri hevur longu órógvað altjóða oljumarknaðin, og tað hevur noytt onnur lond at økja sína framleiðslu. Eitt nú er framleiðslan í Saudiarabia so stór, sum hon næstan ongantíð hevur verið fyrr. USA hevur biðið Saudiarabia framleiða meiri olju fyri at nøkta tørvin og fyri at halda prísinum niðri, og hesum hava saudiarabar játtað.

## Funnu jarnaldargrøv

Fornfrøðiongar í Kroatia hava funnið eina grøv, sum eftir øllum at døma er frá jarnøldini umleið 700 ár fyri Kristi føðing, skrivar ein kroatisk tíðindastova.

Grøvin varð funnin í Papuk-fjallinum, sum er einar 150 kilometrar eystan fyri høvuðsstaðin Zagreb. Sambært tíðindastovuni hava fornfrøðingarnir funnið ymisk amboð í grøvini so sum øksir umframt nakrar prýðislutir.

-Vit hava longu avdúkað ein part av søguni, sum vísir, at her búðu fólk fyri umleið 2700 árum síðani, sigur fornfrøðingurin Hrvoje Potrebica, sum starvast á fornfrøðiliga stovninum í Zagreb.

# Labour-uppreistur ímóti Blair

**Minst ein ráðharri og tíggju stjórnarskrivarar hótta við at leggja frá sær, taka bretar lut í álopinum á Irak, og í undirhúsinum hótta nógvir Labour-limir við at atkvøða ímóti forsætisráðharranum.**

BRETLAND
*Árni Joensen:*

Higartil hava tríggir av teimum persónligu skrivarunum hjá bretskum ráðharrum boðað frá, at teir fara at leggja frá sær, tekur Bretland lut í einum álopi á Irak uttan ST-góðkenning. Men sambært blaðnum The Sunday Times umhugsa einir sjey aðrir skrivarar at gera tað sama.

Ein av ráðharrunum í Blair-stjórnini hevur longu kunngjørt, at hon fer frá, eru bretskir hermenn við í einum álopi á Irak uttan ST-góðekking. Tað er .

Samstundis er greitt, at Tony Blair fær harða mótstøðu frá sínum egnu í undirhúsinum. Tá Irak-kreppan var til viðgerðar í undirhúsinum herfyri, atkvøddu 122 floksfelagar hjá Blair ímóti stjórnini, men nú verður roknað við, at umleið 200 av floksfeløgunum hjá forsætisráðharranum eru til reiðar at atkvøða ímóti honum, tekur ST-trygdarráðið ikki undir við at leypa á Irak.

Tann vanligi bretin er eisini ímóti kríggi uttan góðkenning frá ST. Tann seinasta kanningin vísti, at 62 prosent eru ímóti kríggi við Irak, tekur ST ikki undir við tí. Bara 15 prosent halda tað ikki vera neyðugt við ST-góðkenning.

# CIA flutt smádreingir til USA til avhoyringar

**Tveir synir yvirgangsmannin Khalid Sheikh Mohammed sita sambært blaðnum Washington Post í varðhaldi hjá amerikansku fregnartænastuni CIA.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Blaðið veit at siga, at CIA fekk fatur á tí níggju ára gamla Yousef al-Khalid og tí sjey ára gamla Abed al-Khalid undir einum átaki í Pakistan í september í fjør. CIA leitaði tá eftir Khalid Sheihk Mohammed, og undir einari húsarannsókn komu menn hjá fregnartænastuni fram á teir báðar smádreingirnar, skrivar Washington Post.

Khalid Sheikh Mohammed var í somu húsunum, men tað eydnaðist honum at flýggja, áðrenn CIA kom hagar. Teir báðir smádreingirnir og ein maður vórðu verandi eftir, og hóast teir royndu at fjala seg, vórðu teir tiknir.

Síðani handtøkuna hava teir báðir dreingirnir verið í varðhaldi hjá pakistansku trygdartænastuni, men um vikuskiftið vórðu teir fluttir við flogfari til USA. Tað váttaði CIA sunnudagin, og sagt varð, at dreingirnir eru á einum loyniligum staði.

Í USA ætlar CIA at avhoyra teir báðar smádreingirnar fyri at vita, hvat teir vita um virksemið hjá pápanum. Ein talsmaður hjá CIA sigur við Washington Post, at teir báðir dreingirnir fáa góða viðferð, men at fregnartænastan kortini ætlar at kanna, hvat teir báðir vita um pápan, ella um teir yvirhøvur vita nakað um, hvat hann hevur tikist við.

Samstundis verður 37 ára gamli pápi teirra avhoyrdur á amerikansku herstøðini Bagram í Afghanistan. Washington Post skrivar, at hann hevur fingið at vita, at CIA hevur synir hansara í varðhaldi, og á tann hátt vónar fregnartænastan at fáa hann at siga tað, sum hann veit um al-Qaeda og at avdúka, hvar sjálvur leiðarin í al-Qaeda, Osama bin Laden, er.

# Hurlivasi hjá Strandferðsluni

**Fríggjadagin var rættiligt kaos á ferjuleguni í Klaksvík. Orsøkin var illa fyrireikað vaktarskifti, tá Ternan varð tikin úr aftur siglingini, sum hon hevur røkt fyri Dúgvuna seinastu 7 vikurnar**



*Hóast bíðirøðin á ferjuleguni fylti fleiri ferjur, fór Ternan tóm av Klaksvík fríggjadagin. Eingin góð frágreiðing frá teimum, sum hava ábyrgdina, er nóg góða at blíðka tey, sum máttu bíða í tímar henda dagin. Hetta var ikki fyrstu ferð at slíkt, undarligt er komið fyri hjá Strandferðsluni*

*(Mynd: Norðlýsið)*

SAMFERÐSLA
*Rúna Sivertsen*

Ferðafólk, sum skuldu um Leirvíksfjørð fríggjadagin, vóru snøgt sagt á gosi. Orsøkin var, at Ternan varð tikin úr sigling mitt í ringastu "myldretíð" og send av Klaksvíkini tóm. Har slapp ikki ein einasti bilur við, hóast bíðirrøðin fylti fleiri ferjur.

Sosialurin hevur spurt Poul Jákup Thomsen, ferðafólkaflutningsleiðara á Strandferðsluni, hví hetta hendi.

- Ja, har kiksaði okkurt, og har hendi onkur misskiljing, sigur hann.

Spurdur, hví slíkur kiksari hendir, sigur Poul Jákup, at tað er ein góður spurningur.

- Ein onnur ætlan varð gjørd, men eg minnist ikki rættiliga, hvat tað var. Eg má tosa við Páll Heinesen, sum fyrireikaði skiftið, fyrst, áðrenn eg kann úttala meg, sigur Poul Jákup.

Spurdur, hvør hevur ábyrgdina av hesum, sigur hann:

- Tað burdi verið eg. Poul Jákup sigur, at Sam sigldi longri út á kvøldið henda dagin, so at allir bilar kundu sleppa tvørturum í sámiligari tíð. Hann viðgongur tó, at teir kundu havt gjørt okkurt betur, og tað munnu mong vera samd við honum í.

### Undarlig undanførsla

Søgur vilja vera við, at Ternan kundi ikki taka ferðafólk og bilar við henda túrin, tí bilett-maskinurnar máttu umborð á Dúgvuna. Hetta er eitt sindur ilt at skilja hjá teimum, sum seinastu vikurnar hava ferðast við Ternuni, tí ferðaseðlarnir verða altíð seldir við landgangin, tá fólk eru á veg umborð. Tí mátti borið til at gjørt sum vanligt,og síðani sett bilett-maskinurnar í land til nýtslu hjá Dúgvuni, tá hon byrjaði aftur at sigla.

Í vikuskiftinum vóru legur bæði í Nesvík og á Zarepta. Legan í Nesvík var fyri hvannasundsfólk; tí fóru óvanliga nógv ferðafólk á veg úr Klaksvík til Leirvíkar fríggjadagin.

Vit settu okkum eisini í samband við stjóran á Strandferðsluni, Kristian Davidsen, og spurdu hann, hví Ternan fór tóm av Klaksvík.

Hann sigur, at Ternan var ikki longur í sigling, og tí eftir reglunum um trygd, ikki kundi taka ferðafólk ella bilar.

Kristian leggur tó aftrat, at teir møguliga kundu gjørt okkurt betur.

- Vit vilja fegin koma í ein dialog við norðoyingar um, hvussu farleiðin um Leirvíksfjørð kann virka betur, sigur hann.

Hann sigur, at tað tó er neyðugt at hava virðing fyri teimum fíggjarkarmum, sum politiski myndugleikin hevur ásett.

Tað vóru júst 7 vikur fríggjadagin, síðani Dúgvan brádliga varð tikin úr sigling, tí hol var á gronini. Tá sótu fólk í Leirvík og bíðaðu í tímavís og ánaðu ikki, hvat var galið. Tey, sum ringdu á Farstøðina, vórðu lika "klók", tí har vistu tey einki at siga, hvar Dúgvan bleiv av.





*160 børn og ung blástu, spældu og sungu, tá Rútmisku musikkskúladagarniar endaðu við einum braki í Norðurlandahúsinum sunnudagin. Her er tað Eirikur Skála, sum stjórnar einum av trimum Big bandum, sum vóru við*

*Myndir: Ingi Rasmussen*

# Musikkskúlin byggir rútmiskar brýr

**Íblásturin kom frá Afrika, tá árligu rútmisku musikkskúladagarnir vóru hildnir um vikuskiftið. Tórshavnar Musikkskúli skipar fyri, og 160 ungfólk úr øllum landinum luttóku, tá Big Band, poppur, blues, gospel og rockur funnu saman í sannari harmoni**

TÓNLEIKUR
*Ingi Rasmussen*

Rútmur, gleði og talent.

Tey trý orðini lýsa frægast Rútmisku musikkskúladagarnar 2003, sum vórðu hildnir í Kommunuskúlanum í Havn um vikuskiftið og endaðu við einum braki í Norðurlandahúsinum.

Musikkskúladagarnir byrjaðu fríggjadagin klokkan 15, tá børn og ung úr øllum landinum settu hvørjum øðrum stevnu. Tey vandu út á midnátt fríggjadagin, allan leygardagin og høvdu ljóðroyndir sunnudagin.

Tórshavnar Musikkskúli við Napoleon Nolsøe á odda skipar fyri, men luttakarar og lærarar koma úr øllum heraðshornum at blása, sláa, spæla og syngja.

### Gleði fyri lívið

Sunnudagin klokkan 16 var konsert í Norðurlandahúsinum, og teir nógvu, ungu luttakararnir borgaðu fyri, at stóri salurin varð fyltur. Útselt varð, og tónleikararnir megnaðu eisini væl og virðiliga at røkka út í hvønn krók.

Hóast byrjanin var nakað trilvandi, so gekk konsertin væl, og spírandi evnini fingu víst, hvussu stóran týdning musikkskúlin hevur fyri menningina av føroyskum tónleiki.

Fleiri gávurík stórtalent vóru á pallinum, og harafturat fingu fólk høvi at hoyra og síggja sanna spæligleði. Og hon er ikki at forsmáa. At duga at handfara eitt ljóðføri er ein gáva, sum kann gleða teg alt lívið, hóast tær ikki nýtist at vera nakar virtuosur fyri tað.

### Svart og hvítt

Ársins tema var Afrika. Allur tónleikurin hevði onkursvegna rútmiskar røtur til svarta meginlandið, har upprunafólk samskiftu sínámillum við trummum.

Trummuskinnini úr Afrika vórðu so við og við blandað upp í tey klassisku instrumentini hjá teimum hvítu, ið róptu seg siviliserað. Svørtu rútmurnar settu futt í tann hvíta mannin, og tað mátti áskoðarin í Norðurlandahúsinum eisini sanna sunnudagin.

Hendan dagin bygdi tónleikurin ikki bara brýr millum ungdóm á ymsum oyggjum í Føroyum. Vit vóru samstundis mint á, at tónleikur er gott amboð, tá byggjast skulu brýr millum lond, fólkasløg og ymsar fatanir, sum hava ilt við at tosa saman.

### Trummur og klimaks

Konsertin var skilagott skipað á tann hátt, at tvey orkestur vóru inni á gólvinum í senn. Meðan annað spældi, bíðaði hitt, og soleiðis gekst so skjótt sum yvirhøvur til bar at fáa drúgvu skránna frá hondini. Eitt sera gott hugskot, sum kann endurnýtast, tá onnur stór tiltøk skulu fyriskipast.

Tað vóru heili 160 luttakarar til rútmisku musikkskúladagarnar í ár. Og tað er eitt bragd at fáa tað avgreitt upp á 1 tíma og 40 minuttir.

Í ár vóru trý Big Band, sum vóru minni og meiri vand. Tey sótu vinstrumegin á gólvinum. Høgrumegin vóru poppbólkarnir, og tey skiftust so um at spæla. Og luttakararnir bæði fingu og góvu eitt stórt upplivilsi.

Serliga stórt var upplivilsi kanska hjá klarinettunum og floytunum, sum vanliga blása klassiskar tónar. Við íblástrinum úr Afrika sluppu tey rættiliga at útfolda seg, og tað hóvaði teimum væl.

Ongin Afrika-konsert uttan eina trummufinalu. Tá trummur, jambur og afrokór endaðu konsertina við 160 glaðum ungdómum úr 8 upp í 16 ár, sum sungu felagssang, so fingu tey smáu hárinin rættiliga at kenna, hvat orðið klimaks merkir.





